## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin til hvassan vind og sum frálíður regn. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Kvívíkingar í Havn

**– Tað eru maskinur, sum gera bløð, vildi Rúni vera við. Kvívíksbørn vitjaðu í gjár Sosialin fyri at síggja, hvussu ein avís verður gjørd**

*Turið Kjølbro*

Hvønn mánadag savnast elstu børnini, sum ganga í barnagarði í Kvívík, til eitthvørt. Tað kann vera til tiltak í húsinum ella útferð onkustaðni. Í vikuni gekk leiðin til Havnar at vitja Sosialin. Orsøkin var, at børnini skulu savna avísir saman at gera pappmaché burtur úr, og tá hildu tey, at skilagott hevði verið fyrst at sæð, hvussu ein avís verður gjørd. So varð.

- Tað eru maskinur, sum gera bløð, vildi Rúni vera við, áðrenn rundferðin í húsinum byrjaði. Blaðstjórin vísti børnunum runt í øllum húsinum, inni í hvørjum rúmi, og sum vera man vístu børnini størstan áhuga inni í myndarúminum. Eftir rundferðina fingu tey sundkist og okkurt leskiligt afturvið.




*Helgi, Tórur, Bjartur, Jóhan Kári, Halla, Sólvá, Rúni, Rúna, Eyðgerð og Hákun saman við Marini og Birnu á vitjan á Sosialinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Skúlabólkur

Vanligt er, at barnagarðar gera nakað serligt burtur úr síðsta árinum hjá barninum í barnagarði. Tey verða savnað í ein sokallaðan skúlabólk, har ymiskt er á skránni. Í Kvívík eru tey saman mánadag, men hinar dagarnar eru tey saman við hinum barnagarðsbørnunum.

– Endamálið er at geva teimum nakrar stuttligar upplivingar. Tey stóru børnini krevja annað og meiri enn tey smáu, og hesi dámar ógvuliga væl at koma saman í skúlabólkinum, sigur Marin í Niðrustovu Durhuus, pedagogur.

– Tey hava lært um sodningarlagið, um hendurnar, og onnur evni hava verið uppi og vent, sigur Birna Mikkelsen, sum gongur triðja árið á Pedagogskúla og sum er í starvsvenjing í Kvívík.

– Mær dámar best at tekna, sigur Sólvá.

– Tað stuttligasta er at byggja borg, sigur Halla, sum sipar til borgina, tey hava bygt og málað í kjallaranum, og sum nú er komin uppá, har tey kunnu spæla við hana.

Tey næstu, sum kunnu vænta at fáa hesi fittu kvívíksbørnini á vitjan, er onkur bóndi í Norðstreymoy.

### Stórur árgangur

Helgi, Tórur, Bjartur, Halla, Sólvá, Rúni, Rúna, Eyðgerð og Hákun fara øll í skúla í summar. Í fjør fóru 4 børn í skúla, so sigast kann ikki annað enn, at komandi 1. flokkur er ein stórur árgangur í Kvívík. Flestu skúlabørnini í 1. og 2. flokki ganga í frítíðarskúla í bygdini eftir skúlatíð.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷14 |
| Qaqortoq | ÷13 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷3 |
| Keypmannah. | ÷2 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷1 |
| Berlin | ÷1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 11 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | ÷5 |
| New Dehli | 13 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt brúgvalag við Føroyar fer norðureftir.




Hátrýstið yvir Polen stendur mestsum í stað, og ein hátrýstryggur til Føroya gevur góðveður komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/01 kl. 06[00]–16/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALL




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 15/01 kl. 06[00]–16/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 72,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

16. jan.: Seinna kvarter
24. jan.: Tendring/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. jan | 01:01 | 13:37 | 00:01 | 12:37 | 00:16 | 12:52 | 03:01 | 15:37 | 04:01 | 16:37 | 11:52 | – | 10:52 | 23:15 | 01:16 | 13:52 | 02:16 | 14:52 | 00:46 | 13:22 | 02:01 | 14:37 |
| 18. jan | 02:00 | 14:22 | 01:00 | 13:22 | 01:15 | 13:37 | 04:00 | 16:22 | 05:00 | 17:22 | 00:15 | 12:37 | 11:37 | – | 02:15 | 14:37 | 03:15 | 15:37 | 01:45 | 14:07 | 03:00 | 15:22 |
| 19. jan | 02:45 | 15:07 | 01:45 | 14:07 | 02:00 | 14:22 | 04:45 | 17:07 | 05:45 | 18:07 | 01:00 | 13:22 | 00:00 | 12:22 | 03:00 | 15:22 | 04:00 | 16:22 | 02:30 | 14:52 | 03:45 | 16:07 |
| 20. jan | 03:30 | 15:53 | 02:30 | 14:53 | 02:45 | 15:08 | 05:30 | 17:53 | 06:30 | 18:53 | 01:45 | 14:08 | 00:45 | 13:08 | 03:45 | 16:08 | 04:45 | 17:08 | 03:15 | 15:38 | 04:30 | 16:53 |